# Viðtøkur fyri Nýrafelagið

*Stovnað 11. apríl 1992*

§ 1.

Navn felagsins er Nýrafelagið. Adressa felagsins er bústaður formansins/-kvinnunnar.

§ 2.

Endamál felagsins er;

at virka fyri og stuðla áhugamálum teirra nýrasjúku, við serligum atliti til dialysusjúklingar og transplanteraði,

at veita upplýsing og ráðgeving um nýrasjúku,

at samarbeiða við onnur feløg, ið virka fyri at bøta um kor teirra brekaðu, í Føroyum eins væl og uttanlands.

§ 3.

Limur í felagnum kann ein og hvør gerast, ið er áhugaður í korum teirra nýrasjúku í Føroyum. Kommunur, stovnar, virkir og feløg kunnu eisini gerast limir.

Limagjaldið verður tað til eina og hvørja tíð ásetta av Nyreforeningen.

Hvør limaskapur gevur eina atkvøðu.

§ 4.

Hægsti myndugleiki felagsins er aðalfundurin, sum skal vera hildin innan 15. februar.

Nevndin skal boða til fundar til hvønn einstakan lim í brævi, í seinasta lagi 14 dagar undan fundardegi, og skulu í hvussu er hesi mál vera á skránni:

1. Val av fundarstjóra og -skrivara.
2. Frágreiðing formansins/kvinnunnar frá virki felagsins í farna ári til góðkenningar.
3. Framløga av grannskoðaðum roknskapi til góðkenningar.
4. Framløga, orðaskifti og atkvøðugreiðsla um uppskot frá nevnd ella limum. (Uppskot frá limum skulu vera nevndini í hendi minst eina viku undan aðalfundi).
5. a. Val av formanni/kvinnu (óstøk ár),
   b. Val av kassameistara (støk ár),
   c. Val av skrivara (støk ár),
   d. Val av einum nevndarlimi,
   e. Val av einum tiltaksfólki,
   f. Val av einum grannskoðara.

Øll val undir 5. petti eru fyri 2 ár og fara fram skrivliga.

Fundarsamandráttur skal førast í gerðabók og undirskrivast av fundarstjóranum og nevndini.

§ 5.

Eykaaðalfundur verður hildin, tá nevndin ella í minsta lagi 1/4 av limunum vilja tað.

Limafundir eiga at vera minst 3 ferðir um árið.

§ 6.

Roknskaparárið er álmanakkaárið. Kassameistarin syrgir fyri at roknskapurin er greiður til grannskoðan innan 20. januar, og verður sendur út saman við fundarboðunum til aðalfundin.

§ 7.

Í nevndini skulu minst 2/3 vera úr bólkinum: dialysusjúklingar/transplanteraði/avvarðandi.

§ 8.

Broytingar í viðtøkunum kunnu bert gerast á aðal- ella eykaaðalfundi, og minst 3/4 av møttu limum felagsins atkvøða fyri teimum.

§ 9.

Felagið kann bert verða avtikið, um í minsta lagi 3/4 av limum felagsins møta á fundi og 3/4 av teimum atkvøða fyri avtøku.

Um so verður, verða ognir felagsins deponeraðar hjá Nyreforeningen í 10 ár. Um ikki nýtt felag við sama endamáli verður stovnað innan hesi 10 árini eru farin, fella ognirnar til Nyreforeningen.

Nyreforeningen kann ikki ábyrgjast fyri skuld hjá Nýrafelagnum.

23/08.-1992